## Dýr bátapláss

Tey, sum halda, at tað er dýrt at hava bát liggjandi í einum bátahyli ella við bátabrýr í Føroyum, kunnu fegnast um, at tey ikki skulu hava bátin liggjandi í Oslo. Sunnmørsposten veit at siga, at herfyri fekk ein maður eina hálva mió. krónur í lumman, tá hann seldi rættindini til at hava ein bát liggjandi í Solvik-bátahavnini í Oslo. Havnarfútin sigur seg ikki hava hoyrt um so dýrt pláss fyrr, men 400.000 krónur er ikki óvanligt, sigur hann.

## Læknatrot

Í syðra parti av Danmark fáa tey ein trupulleika tey næstu árini, tí tað vísir seg, at ein triðingur av øllum læknunum í økinum fara frá fyri aldur innan fyri tey næstu fimm árini. Samstundis er tað ein sannroynd, at tað eru ikki nógvir ungir læknar, sum bíða eftir at fáa størvini, sum verða leys, skrivar JydskeVestkysten. Felagið hjá læknunum í syðra parti av Danmark sigur, at um fá ár verða tað fleiri býir, sum als ongan lækna hava.

# Á Postverkinum eru kvinnurnar í meiriluta

**Við bygnaðarbroytingunum, sum eru farnar at virka frá 1. apríl í ár, eru kvinnuligu leiðararnir í stórum meiriluta.**
**- Hetta avspeglar stovnin, sum hevur væl fleiri kvinnur ansettar enn menn, sigur Sofus Clementsen, Postverksstjóri**

KVINNULIGIR LEIÐARAR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*



*Svannbjørg Manai er nýggjur leiðari av Frímerkjadeildini og kundatænastuni inni á posthúsunum. Hon var í nógv ár marknaðarleiðari á Frímerkjadeildini.*



*Ein av nýggju kvinnuligu leiðarunum er Malan Kjærbo í Saltangará. Hon hevur starvast í 16 ár fyri Postverk Føroya umframt í nøkur ár fyri Post Danmark.*

Leiðslan á postverkinum er spildurnýggj.

Stjórin, Sofus Clementsen, tók við starvinum 1. oktober í fjør, og frá 1. apríl í ár at rokna, er bygnaðarbroyting sett í verk.

Sum ein liður í at menna stovnin og gjøgnumganga tær avbjóðingar, ið stovnurin er fyri, verður leiðslufundur hildin eina ferð um mánaðin. Í dag var so fyrsti fundur við nýggju deildarleiðarunum, ið eru settir frá 1. apríl at rokna.

Eitt heilt sermerkt við postverkinum er, at tað eru nærum tvífalt so nógvir kvinnuligir sum mannligir leiðarar – 13 kvinnur og 7 menn. Hetta er tó ikki nakað, ið ovasta leiðslan tilvitað hevur lagt seg eftir. Heldur er hetta ein avspegling av starvsfólkunum á stovninum. Tað eru nevniliga væl fleiri kvinnur enn menn ansett í postverkinum.

### Drúgvar royndir

Ein av teimum, ið leingi hevur starvast innan økið, er Svannbjørg Manai. Hon hevur í nógv ár verið marknaðarleiðari á Frímerkjadeildini, men við bygnaðarbroytingunum er hon nú blivin leiðari av Frímerkjadeildini og kundatænastuni inni á posthúsunum.

Sofus Clementsen metir, eins og so nógvir aðrir stjórar, at kvinnur eru minst líka góðir leiðarar sum mennn, og at kvinnurnar eru í so stórum meiriluta innan leiðandi størv í postverkinum, ber eisini boð um tað.

Men eisini til aðrar uppgávur standa kvinnurnar seg væl.

- Í Havn og í Klaksvík er stórur meiriluti av mannligum postboðum, men alla aðrastaðni í landinum eru kvinnurnar í meiriluta, eisini á tí økinum, sigur Sofus Clementsen.

### Starvsfelagi heldur enn leiðari

Ein onnur kvinna, sum nú eisini hevur fingið leiðaraheiti, er Malan Kjærbo í Saltangará. Eisini hon hevur drúgvar royndir í postverkinum, har hon hevur starvast i 16 ár. Framman undan tí starvaðist hon í nøkur ár hjá Post Danmark – í Danmark.

Malan hevur sum nevnt verið leingi í starvinum, og kennir tí allar mannagongdir. Tí er hon mest spent uppá, hvussu bygnaðarbroytingarnar fara at roynast í verki.

Eg rokni meg meiri sum ein starvsfelaga heldur enn leiðara, men bara við størri ábyrgd nú, sigur Malan Kjærbo.

Hennara ábyrgdarøki er søla privat í Norðoyggjum og Eysturoynni.




*Sofus Clementsen er nýggjur stjóri á Postverki Føroya. Hann tók við 1. oktober 2006.*